FØROYA SYMFONIORKESTUR

**Kór Føroya Symfoniorkesturs**

FSO fer nú at skipa so fyri at hava eitt fast kór, ella ein fastan hóp av sangarum at heita á. Kórið skal helst hava einar 80 til 100 sangarar.

FSO ætlar tvær ferðir um árið at hava framførslur við kórluttøku, tað árligu nýggjárskonsertina, og tá ið FSO skal framføra størri kórverk við orkestri, sum ætlanin er at gera á hvørjum ári í mai mánaði. Í 2006 verður tað Requiem hjá W.A. Mozart.

Nevndin í FSO fer tí at bjóða royndum kórsangarum og sangfólki úr øllum Føroyum, sum hava áhuga í at vera við til nógv spennandi tónleikatiltøk og tónleikaupplivingar framyvir, at vera við í Kóri Føroya Symfoniorkesturs.

Tú kanst melda teg til á heimasíðuni hjá Symfoniorkestrinum, www.fso.fo, í seinasta lagi mikudagin 15. desember 2005.

Tit fáa síðani boð við telduposti við meira kunning um kórið, tiltøk, venjingar o.s.fr.

FØROYA SYMFONIORKESTUR

FØROYA SYMFONIORKESTUR POSTRÚM 1170 FO-110 TÓRSHAVN TEL.: 211112 WWW.FSO.FO FSO@FSO.FO

# London calling

**Í kvøld er stóra finalan í Global Battle of the Bands kappingini á skránni. Finalan er í London, og okkara íkast er evnaríki bólkurin Marius, sum er uppkallaður eftir frontmanninum Hans Marius Ziska. Bólkurin er ein relativt nýggjur bólkur at síggja til, men allir tónleikararnir í bólkinum eru garvaðir á føroyska tónleikapallinum. Uttan at taka munnin alt ov fullan, vil eg ávara um at í kvøld er góður møguleiki fyri at føroyingar fáa eina nýggja superstjørnu...!**



**UPPTAKT**
*rokur@sosialurin.fo*

Marius bjóðaði her fyri inn til ein kunnandi fund um teirra luttøku á GBOB finaluni. Umboðsmaður teirra Kristian í Vági greiddi frá, at hetta er ein avbera stór avbjóðing sum rúmar fleiri stórar møguleikar fyri bólkin.

Tónleikararnir í bólkinum eru í góðari venjing, og teir meta seg vera væl fyri til finaluna. Teir fara at spæla sama tilfar, sum teir spældu til tey innleiðandi umførini í Føroyum, tí teir meta at tað riggar væl við tí.

Frontmaðurin Hans Marius Ziska, var ikki nógv fyri at siga, hvussu fór at gangast føroyska bólkinum í kappingini, men Jón Tyril er vísur í, at Marius føru at standa seg sera væl. Jón hevur lurtað eftir hinum luttakandi bólkunum, og hann heldur at føroyski bólkurin eigur at hava góðar møguleikar til at klára seg heilt væl á finaluni. “Hetta verður í øllum førum nakað sum føroyingar kunna vera ernir av”, sigur Jón. Tó vísur Jón á, at tað sjálvandi er óvist hvussu dómararnir døma tónleikin.

Tónleikurin hjá Marius er nútímans rokktónleikur. Marius hevur eina feita útstráling á pallinum, og hann sær eisini gott út. Og tað at síggja gott út, er ikki heilt onkisigandi í hesu bransjuni.

Løgini sita sera væl, og Hans Marius hevur eina frálíka rødd til rokktónleik. Afturat sær hevur hann eisini funnið sær framúr góðar tónleikarar. Knút Háberg Eysturstein og Niels Jákup í Jógvanstovu kenna vit úr bólkinum Gestir. Heðin Ziska kenna vit m.a. úr Ygdrasil, Hatespeech og annars úr jassumhvørvinum í Havnini. Hetta vitnar um at Marius hevur eina sterka manning.

### Fløga á veg

Bólkurin Marius er ikki ein sokallaður “prosjekt”bólkur, sum varð settur á stovn til GBOB. Teir hava verið til í eina tíð, og eisini eru teir ávegis við eini fløgu. Teir hava skundað sær við upptøkunum, soleiðis at teir hava tilfar klárt, sum teir taka við sær til London. Umboðsmaður teirra fær úr at gera, við at renna runt við promo-tilfari í London, og hetta meta teir vera sera umráðandi hjá einum bólki sum ætlar sær útum føroyska marknaðin.

Sjálvt um Marius ikki vinna GBOB kappingina, so eru nógv bransjufólk til staðar. Sostatt er kappingin eisini ein frálíkur sýnisgluggi fyri ein bólk.

### Finalan

Í finaluni luttaka 24 bólkar úr øllum heiminum. Sjálvsagt verður tað torført hjá okkara bólki at vinna á teimum øllum, men dygdin á tónleiki er ikki tengd at fólkatalið. Vit vita at tónleikurin hjá Marius er góður nútímans rokktónleikur, og um teir spæla væl í finaluni í kvøld, ja, so er alt møguligt...sjálvt eitt 1. pláss!!!

Í finaluni fært hvør bólkur 8 minuttir at spæla í. Sostatt hevur hvør bólkur heilt stutta tíð til at sannføra dómararnir um at júst tann bólkurin er hann sum eigur at vinna The Grand Price. Marius fara at spæla tvey løg í hesum 8 minuttinum.

Bólkarnir hava 10 minuttir til at gera ljóðroynd. Ljóðroyndin er sera týdningarmikil, tí at hon er avgerandi fyri tín tryggleika á pallinum.

Vinnandi bólkurin sleppur á eina heimsumfatandi konsertferð...og so vinnur hann eisini 100.000 dollarar....!

### Kall stuðlar tónleikinum

Kall stuðlar Marius peningaliga, og hetta gera teir fyri at “vera við har ið tað hendir”. Rógvi Róin greiður frá, at Kall sær stórar møguleikar í Marius, og tí velja teir at stuðla bólkinum. Hann vísir á, at tað er væl møguligt, at Kall fer at hava eitt víðari samstarv við Marius, tá ið GBOB kappingin er farin afturum. Kall vil fegin knýta bond millum tónleik og vinnu, og tí royna teir at luttaka í ymiskum tónleikatiltøkum í Føroyum.

Vit ynskja Marius góða eydnu við kappingini. Vónandi kemur hann heim við onkrum spennandi í viðførinum.

FÆST UM ALT LANDIÐ




einans 149,-

Ein hent jólagáva

SKIPALISTIN **hevur lógarkravdan** føroyskan álmanakka

Jólakort

myndatøku í hunaligum jólaumhvørvi



10 stk. Jólakort/umslag við myndatøku í hugnaligum umhvørvið kr. 120,-

10 stk. Jólakort/umslag eftir egnum negativum ella digitalt kr. 80,-

fotobúðin í miðbýnum

Kodak express Digital Solutions

Sverrisgøta 7 - Postboks 1016 - 110 Tórshavn - tlf. 311661 - e post foto@foto.fo